# Starv á Føroya Barnaheimi

Søkt verður eftir einum starvsfólki til Familjudeildina á Føroya Barnaheimi. Starvið ið er tíðaravmarkað í 1 ár, verður leyst til setan frá 1. mai 2006 ella skjótast til ber. Tann ið settur verður í starvið, skal starvast í skiftandi vaktum á Familjudeildini.

**Um Familjudeildina:**
Á Familjudeildini eru 7 fólk í starvi, øll við viðkomandi útbúgving.
Endamálið við arbeiðnum á Familjudeildini er, at foreldrini verða styrkt og stuðla í at vera foreldur, soleiðis at familjan kann virka betur sum ein heild. Eisini er endamálið at fáa greiðu á, hvørjar styrkir og hvørjar trupuleikar familjan hevur, og í hesum sambandi meta um, hvat slag av stuðli er best og mest viðkomandi at veita familjuni framyvir.

**Førleikakrøv:**
Vit sóknast eftir einum starvsfólki, ið hevur ávísan kunnleika til familjuarbeiði. Tað er umráðandi, at viðkomandi hevur fakligan áhuga og góð samstarvsevnir. Tann ið settur verður, skal kunna arbeiða sjálvsstøðugt.
Ein partur av arbeiðnum er skriftligt arbeiði, og viðkomandi má tí vera góður at málbera seg skriftligt.

**Útbúgving:**
Fyrimun hevur umsøkjari sum hevur útbúgving sum pedagogur, sosialráðgevi, sjúkrasystir, fysioterapeutur ella ergoterapeutur. Ynskiligt hevði verið, um viðkomandi somuleiðis hevur eina terapeutiska eftirútbúgving.

**Løn:**
Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Um umsøkjari við aðrari útbúgving enn teim omanfyri nevndu fær starvið, verður viðkomandi løntur eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag fyri hjálparfólk.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 30. mars 2006.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Súsonnu Nolsøe, deildarleiðara ella Beintu Johannesen, leiðara á tlf. 312320

**Føroya Barnaheim**
Pedda vid Steinsgøta 10
Fo - 100 Tórshavn



*Runavíkar kommuna hevur seinastu árini verið í støðugum vøkstri og menning. Kommunan hevur uml. 3.700 íbúgvar og 140 ársverk, og er í einari positivari menning innan økir, sum mentan, vinnulív, tænastu, undirvísing og íbúgvaraviðurskifti.*

## Fíggjarleiðari
Runavíkar kommuna

Starvið er tvíbýtt soleiðis at fíggjarleiðarin hevur yvirordnaðu ábyrgdina fyri kommunalu fíggjarstýringini, og er eisini starvsfólkaleiðari. Arbeiðsuppgávurnar, sum viðkomandi kemur at røkja, eru í høvuðsheitum hesar:

**Høvuðsuppgávur:**
Fíggjarleiðsla:
- Leiða fíggjardeildina (Roknskap, búskap, frágreiðingar v.m.)
- Koma við ársfrágreiðing av fíggjarligu gongdini í mun til fíggjarætlan og politiskt settir málsetningar. Frágreiðing í mun til fíggjarætlan skal gerast hvønn mánað.
- Gjaldførisstýring, lønsemismetingar og íløgumetingar.
- Skipa fyri at støðugt optimalisera fíggjarumsiting og veitaraavtalur.
- Kunnað býráðið um týðandi broytingar í inniverandi fíggjarári í mun til ætlaðar útreiðslur og inntøkur.
- Tryggja góðan stuðul til fíggjarstýringina á undirdeildum og um neyðugt skipa fyri upplæring.

Starvsfólkaleiðsla:
- Saman við øðrum leiðarum at tryggja trivnað hjá starvsfólki.
- Saman við starvsfólkunum leggja ætlanir fyri menning hjá starvsfólkunum, fyri soleiðis at styrkja kommunala førleikan.
- Leggja frítíðarætlanir soleiðis, at hetta darvar dagliga kommunala virkseminum minst møguligt.
- Taka avgerðir í starvsfólkamálum, innanfyri teir karmar ið eru ásettir av Býráðnum bæði fíggjarliga og starvsfólkaliga.

**Ynskiligir førleikar:**
- Leiðsluførleikar og góð samstarvsevnir.
- Royndir frá samráðingum og ger av avtalum.
- Royndir innan roknskap og fíggjarstýring.
- Royndir frá verkætlanum og verkætlanarroknskapum.
- Hollan teldutøkniskan førleika.
- Hægri viðkomandi útbúgving.

**Persónligir eginleikar:**
Sum persónur vænta vit, at tú ert neyvur, ágrýtin og miðvísur, tær dámar væl stórar avbjóðingar og tú hevur lætt við at samstarva. Harafturat vænta vit, at tú er fleksibul og kanst arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, tá tað krevst. Tú trívist við at arbeiða ímóti freistum og hevur evnir til at hava ein jaligan hugburð bæði innanhýsis og uttanhýsis.

Løn og setanartreytir annars verða sambært avtalu arbeiðsgevara.

**Nær og hvar:** Umsóknir verða at senda skjótast gjørligt og í seinasta lagi mánadagin 10. apríl 2006 til: Runavíkar kommunu, Heiðavegur 26, 600 Saltangará, tlf. 417000. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Rodmundur Nielsen, Borgarstjóra. Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

## Burturstødd

Eg eri burturstødd frá 16. mars.

Verið aftur at hitta mánadagin 27. mars

**Frisørsalongin hjá Jórun**
Saltangará · Tel 44 72 64



## Hanusargøta 2 til sølu



Húsini eru í serklassa, í trimum hæddum, alt innrættað.

Húsini standa í friðarligum umhvørvi og hava sera gott útsýni.

Nærri fæst at vita við at venda sær til:

**Advokatskrivstovuna**
Fr. Petersensgøta 9 · Postbox 6 · FO-110 Tórshavn
Tel (298) 311145 · Fax (298) 311525

Halgir Winther Poulsen, adv. - Fríða Patursson, adv.
Ólavur Jákup Kristoffersen, adv. - Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv - Jógvan Elias Winther Poulsen, adv.

att: Niels Winther Poulsen, adv.: nwp@jura.fo
ella Petra Viderø Johannesen, skrivari: pvj@jura.fo

Sosialurin 341800

## ADVOKATSKRIVARI SØKIST

ADVOKATVIRKIÐ

Til setan skjótast tilber verður søkt eftir skrivara til fjølbroytt fulltíðarstarv.

Sum hjartað í virksemi okkara er neyðugt at skrivarin umframt at vera vanur við vanligt skrivaraarbeiði er opin, vinarligur, sjálvstøðugur og førur fyri at hava tamarhald á fleiri træðrum samstundis. Kunnleiki til advokatyrkið er ein fyrimunur.

Skrivlig umsókn verður at senda til Advokatvirkið, Postsmoga 85, 110 Tórshavn, ella teldupost á: teirin@post.olivant.fo innan 20. mars 2006.

SKRIVSTOVUSAMSTARV
**ADVOKATVIRKIÐ**
Páll Nielsen, adv. - Eyðhild Skaalum, adv.
Sigmund Poulsen, adv. - Hans Trygvi Teirin, adv.

Skansavegur 1 · Postsmoga 85 · FO-110 Tórshavn
Tel 312171 · Fax 315874
e-mail: advokat@post.olivant.fo